# Havnar Bio

kall Coca-Cola

UMMÆLI:

## Jarhead

Hetta er søgan um Golfkríggið í 1990/91. Søgan, soleiðis sum vit ikki hava sæð hana áður - nevnliga úr eygunum á marinudeildunum, sum eisini tóku lut her. Í brennnandi sól, fúkandi oyðimarkarsandi og hóttanina um deyða beint handan næsta sandheyggin.

Anthony Swofford er bara 20 ára gamal, tá boðini um at verja amerikonsk áhugamál í eini fjarskotnari oyðimørk verða givin. Hann og vinmenninir fara avstað til eitt kríggj. Teir hava fingið venjing við atlitið til júst hesa støðu, men teir vita als ikki, hvat fer at henda.

Hernaðarlegan er mitt í oyðimørkini, og skrúðgongur og inntøka av vætu er sum so tað einasta, sum teir hava at taka seg til. Og brøvini heiman ífrá siga aloftast frá um onkra damu, sum ikki orkar at bíða meira, og sum tí ger tað liðugt.

Tí koma boðini um at leypa á nærum sum ein lætti, men einki kundi fyrireika teir til sjónina, sum teir hittu hinumegin markið til Kuwait.

Jarhead er filmatiseringin av sjálvbiografisku skaldsøguni hjá Anthony Swofford, sum hann gav út í 2003. Tað er Sam Mendes, sum hevur leikstjórnað filminum, har Jake Gyllenhaal hevur høvuðsleiklutin. Aðrir høvuðsleikarar eru Peter Sarsgaard og Jamie Foxx.



TÍÐIRNAR:

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu




### Jarhead

*FRUMSÝNING*

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 13.01 | kl. 21.00 | kl. 23.30 |
| Leygardag | 14.01 | kl. 21.00 | kl. 23.30 |
| Sunnudag | 15.01 | kl. 20.00 | kl. 22.30 |




### Stolthed & fordom

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 13.01 | kl. 19.15 |
| Leygardag | 14.01 | kl. 19.15 |
| Sunnudag | 15.01 | kl. 18.30 |




### Narnia

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 13.01 | kl. 18.00 |
| Leygardag | 14.01 | kl. 18.00 |
| Leygardag | 15.01 | kl. 17.00 |




### King Kong

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 13.01 | kl. 22.00 |
| Leygardag | 14.01 | kl. 22.00 |
| Sunnudag | 15.01 | kl. 21.15 |

KOMANDI FILMUR:

*FRUMSÝNING*

### Elizabethtown

Fríggjadag 20.01